*Atli Dam eftir tvey skeið sum løgmaður – avmyndaður á Tinghelluni í Tinganesi seinast í sjeytiárunum. Um hetta mundið samstarvaði Javnaðarflokkurin við Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin – og gongd kom á yvirtøkurnar. Men hetta samstarv endaði við nývali í úrstíð í 1980*



*Framhald av s. 13*

starv. Eins og í samráðingunum um fiskimarkið, so var tað løgmaður, ið stóð á odda í føroysku samráðingarnevndini. Tá var tað, at Atli Dam fekk skoðsmál sum ógvuliga miðvísur og treiskur samráðingarleiðari.

Eftir fleiri val ljóðaði, at tað vóru samráðingar millum gomlu heimastýrisflokkarnar, men tað samstarvið kom ikki afturíaftur, meðan Atli Dam var formaður í Javnaðarflokkinum. Eftir valið í 1984 skipaði Atli Dam samgongu saman við Tjóðveldisflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Kristiliga Fólkaflokkinum.

Í seksti árunum varð farið undir útbygginar av føroyska valferðarsamfelagnum eftir norðurlendskum leisti. Í sjeyti og í áttati árunum vórðu stórar útbyggingar framdar á heilsuøkinum, almannaøkinum, skúlaøkinum og ikki minst á samferðsluøkinum. Havnir, vegir, tunlar og brýr og ferjur til sigling innan- og uttanlands, og elektroniski infrastrukturin, sum vóru fyritreyt undir menning av vinnulívinum og lívskorunum hjá teimum einstøku og lokalsamfeløgunum, vórðu nógv útbygd í tíðini, tá ið Atli Dam var løgmaður.

Tað var í 1984-88 valskeiðnum, at stuðulsveitingarnar úr Danmark vórðu umlagdar til blokkstuðulsskipan, og tað var eisini í hesum skeiðnum, at Atlantic Airways varð sett á stovn.

## Kanónvalið og fallið

Størstu álitisváttanina í politiska lívinum fekk Atli Dam á løgtingsvalinum 17. november í 1990. Tá vann Javnaðarflokkurin tíggju valdømisvaldar tingmenn. Møguleikar vóru fyri tvey flokka meiriluta landsstýri saman við Fólkaflokkinum, og Atli Dam nýtti møguleikan. Tá ið landsstýrið varð skipað í januar 1991, boðaði Atli Dam frá, at hann orsakað av heilsutrupulleikum fór at taka seg aftur sum løgmaður mitt í valskeiðnum. Hann helt orð. 18. januar 1993 tók Marita Petersen við sum løgmaður, og Atli Dam gjørdist tingmaður og dagligur leiðari í Realinum. Har hevði Atli Dam eisini verið leiðari 1981-85 og 1989-1990.

Ein av orsøkunum til at valið í 1990 var so framúr gott hjá Javnaðarflokkinum var, at Atli Dam eftir áheitanir undan fleiri valum, flutti uppstilling úr Suðuroyar valdømi og í Suðurstreymoyar valdømi, har hann við 1356 persónligum atkvøðum lyfti Javnaðarflokkinum til úrslit, sum flokkurin ongantíð frammanundan hevði fingið í høvuðsstaðnum.

Fýra ár seinni var uppstillingin hjá Atla Dam í Suðurstreymi orsøk til, at hann ikki varð afturvaldur, tá ið Javnaðarflokkurin misti helmingin av tingsessunum og bert fekk fimm tingmenn valdar. Tá varð lítil ivi mettur at vera um, at Atli hevði varðveitt løgtingssessin so leingi, sum hann sjálvur hevði havt hug til tað, um hann hevði havt verið uppstillaður í Suðuroyar valdømi og ikki í høvuðsstaðnum.

## Uttan fyri landoddarnar

Atli Dam hevði í uppvøkstrinum fingið politikkin í blóðið. Hann fylgdi væl við í, hvussu politiska heimskortið myndaðist og broyttist, og ikki minst hevði hann stóran áhuga í donskum og norðurlendskum politikki.

12. desember í 1990 varð Atli Dam valdur í fólkatingið við 2.086 persónligum atkvøðum. Meðan hann var løgmaður í 1991 og 1992, var eykamaður í fólkatinginum, men í 1993 og fram til fólkatingsvalið 21. september í 1994 var hann aftur í fólkatinginum. Frá 1989 og fram til 1991 var Atli Dam limur í Norðurlandaráðnum.

## Minnisvarðin

Umframt omanfyri nevndu arbeiðssetningar, sum Atli Dam var við til at røkka, og sum hann ofast var oddamaður fyri at avrika, er tað serliga ein varði, sum stendur eftir politiska starvið hjá honum. Tað er yvirtøkan av ráevnunum í undirgrundini. Hetta var drúgt arbeiði.

Farið varð undir fyrstu samráðingarnar við danir miðskeiðis í sjeyti árunum. Málið var rokkið 11. september 1992 ella dagin fyri 60 ára føðingardagin hjá Atla Dam, sum tá var løgmaður. Henda dagin boðaðu Poul Schlüter og hansara menn Atla Dam og landsstýrinum frá, at stjórnin hevði gjørt av, at Føroyar kundu yvirtaka ráevnini í undirgrundini treytaleyst.

Síðani tá hevur nógv verið tosað og skrivað um, hví danir vóru vornir so medgjørligir. Atli Dam undirstrikaði aftur og aftur, at gongdin í hesum málinum var skúladømi um, hvat kundi spyrjast burturúr, tá ið serfrøðin og politiski myndugleikin aftur og aftur løgdu aftur á aftur fyri at sannføra donsku myndugleikarnar um, at føroyingarnir høvdu bestu kortini á hondini.



*Í 1990 vann Javnaðarflokkurin stórsigur á løgtingsvalinum, og Atli Dam kundi nú skipa eina tveyflokkasamgongu millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin. Tá boðaði hann frá, at hann ikki fór at sita sum løgmaður alt valskeiðið. Hann legði frá sær í januar í 1993, og Marita Petersen gjørdist løgmaður*